TILTØK

Kirkju- & missiónshúsið á Argjum
Á møtinum sunnukvøldið talar Eivind Mouritsen av Argjum.

Hebron, Argir
Sunnudagin kl. 10.30: Morgunmøti. Øssur Berghamar talar.
Barnaansing er samstundis.
www.hebron.fo

Havnar kirkja
Sunnudagin 3. august kl. 11.00 prædikar Johannes Møllehave. Talvan gongur fyri KFUM í Havn.

Frelsunarherurin, Tórshavn
Leygardagin kl. 11.00: Útifundur.
Sunnudagin møti bert kl. 18.00.
Mikudagin kl. 15.00: Bønarmøti.
Øll eru vælkomin.

Meinigheitin í Hoyvík
uppi á Brekku 3
Í dag After Eight, høllin er opin frá 13 – 15.
Sunnudagin gudstænasta kl. 11.00 v/Jóna Johannesen, Sunnudagsskúlin er í summarfrí, lýst verður tá byrjað verður aftur.
Mánakvøldið bønarmøti kl. 20.30.

Adventkirkjan
Leygardagin kl. 11.00: Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus – høvuðsprestur okkara.

Katólska kirkjan
Hvønn gerandisdag kl. 17.30: Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Leygardag kl. 11.30: Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Sunnudag kl. 11.00: Hámessa v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni.

Samkoman Rhema
Staravegur 5
www.rhema.fo

Filadelfia
Landavegur 22
www.filadelfia.fo

Ebenezer
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

Meinigheitshúsið, Tórshavn
Sunnudagin kl. 18.00: YM-møti v/ Snorra Brend, har høvi verður at seta spurningar.
Týskvøldið kl. 20.00: Bíbliutími v/ Snorra Brend.

Samkoman Immanuel
Í kvøld kl. 20.00: Kongsins Herlið. 8 ár og eldri eru vælkomin.

Tórshavnar Hvítusunnusamkoma
Yviri við Strond
Ongi møti verða nú sunnudagin. Tann 10. august kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 18.00: Evangeliskt møti v/ Jóhan Hendrik Hansen.
Mánakvøldið kl. 20.00: Húsmøti hjá Jón og Binu.
Telefonandaktin 424741

Samkoman Lívdin
Ongi møtir verða 27. juli og 3. aug.
Heimasíðan: www.livdin.fo

Lívsins Orð
Runavík
Møti verður sunnudagin kl.11.30.

Meinigheitshúsið á Skála
Sunnudagin 3. august verður møti í Meinigheitshúsinum. Vit byrja kl. 17.00 við sangi og orðum. Kl.. 17.30 verður náttturði. Kl. 19.00 verður møti við Jógvan Steintún. Evni: Hvat er eitt kristniliv. Sangkreftir av Skála syngja. Innsavning til húsið. Barnaansing verður meðan møtið er. Drekka verður eftir møtið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21.00: Opið hús við Dánjal Petersen.
Sunnumorgunin kl. 11.00: Møti v/ Súsonnu og Niels Martin Olsen.
Sunnukvøldið kl. 18.00: Tvørkirkjuligur takkar- og forbønargongutúrur í Runavík. Byrjað verður frá Blómuhandlinum Orkis á Glyvrum. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

Getsemane, Klaksvík
Sunnudagin kl.18.00 er møti. Tú ert hjartaliga vælkomin!

KFUM & K, Klaksvík
Fríggjakvøldið kl.22.00: Opið hús.
Sunnudagin kl.14.00: Sunnudagsskúli, kl.17.30: Bønarløta, kl.18.00: Møti við Jóhannis Jóhannesen, kl. kl.21.00: Ungdómsmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

Betania, Skopun
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Skopun
Sunnudagin kl. 17.30: Bønar- og lovsangsløta. Kl. 18.00: Møti. Innsavning.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti við Katrin Mortensen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møtið.
Øll eru hjartaliga vælkomin.

Missiónshúsið í Vági
Møti verður sunnukvøldið kl. 18.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin:
kl. 11.00: Breyðbróting,
kl. 18.00: Evangeliskur fundur
kl. 21.00: Útifundur um viðrar
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

Sion, Vágur
Sunnudag kl. 11: Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánakvøld kl. 21: Bønarmøti. Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja, um tær tørvar forbøn.

Felagið Tórshavn: Útferð
Gongutúrur á Eysturoyarsillini. Farið verður av Kunningarstovuni. Miðaltungur túrur. Havið heit og góð gonguklæði og matpakka við. Tilmelding.

Tilhaldið
í Tórsgøtu 21, tlf. 316491
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
Frá 1. juli til 18. august hava vit opið frá kl. 13.00-17.00.
Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Føroya Heimavirkisfelag
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

Tilhaldið í Sandoynni
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

NA (Anomymir narkomanar)
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630. Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

ACA
(Adult children anonymous).
Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsariinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail: acafaroeislands@hotmail.com

AA-fundir í Havn
Reinsariið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.30
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

Al-Anon
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontið er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

AA-fundir í Eysturoy
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan. Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

AA-fundir í Vágum
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

Al-Anon í Vágum
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

AA-Suðuroy
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

AA í Vági
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

Blái Krossur – Glyvrar
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

Blái Krossur – Eiði
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

Javni
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí*. Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

Náttarravnarnir í Tórshavn
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

Lymfødemfelagið
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

Spælistovan í Meinigheitshúsinum
er farin í feriu frá 26. juni til 1. september

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø.
Sparikassi 442027-8.

Heilafelagið, MBF-húsið
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

Parkinsonfelagið
MBF-húsið, Íslandsvegur 10C
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

Ráðgeving um heilaskaðar
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeiðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail: jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

MBF – Meginfelag teirra brekaðu
MBF skrivstovan verður stongd frá mánadegi 14. juli til 10. august.

Giktafelag Føroya
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.

Fibromyalgibólkurin: Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
Foreldraumboð:
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
Ungdómsumboð: Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

GULLBRÚDLEYP

Leygardagin 2. august hava Marita og Mortan Joensen, Argir, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 2. august frá kl. 10.00 til 15.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

SILVURBRÚDLEYP

Týsdagin 5. august hava Elisabeth Hvítklett og Jógvan Joensen Sørvágur verið gift í 25 ár.
Dagurin verður hildin í heiminum leygardagin 2. august við morgunmati frá kl. 8.00. Øll eru hjartaliga vælkomin.

BRÚDLEYP

Leygardagin 2. august kl. 12.00 giftast á Ráðhúsinum í Ålborg Liss Johannesen, Leirvík, ættað úr Streymnesi, búsitandi í Leirvík, og Eliesar (Essa) Jacobsen, Leirvík. Brúdleypsadressa: Stationsmestervej 40, st.tv., 9200 Ålborg SV.

Leygardagin 2. august kl. 17.00 giftast í Kirkjubøar kirkju Rikke Bak og Leif Sørensen. Brúdleypið verður hildið í Roykstovuni í Kirkjubø.

Leygardagin 2. august giftast í Marstal kirkju Dorthe Weber úr Marstal og Rúni F. Fjallstein av Argjum. Brúdleypsadressan er Lærkegade 12, 5960 Marstal.

Leygardagin 2. august giftast Annika Midjord, Argir, og Jacob Trans, Keypmannahavn. Vígslan verður kl. 15.00 í samkomuni Immanuel, Brekkutún 3, Hoyvík, og veitslan verður fyri innbodnum í Pálsstovu kl. 18.00.

Leygardagin 9. august kl. 11.00 giftast í Christianskirkjuni í Klaksvík Gudrun Óladóttir Poulsen og Steinbjørn Zachariassen. Vælkomst verður í Skálanum kl. 13.00. Tey, ið ynskja at gleða brúðarparið við at koma, verða biðin um at siga frá á tlf. 226206, 222658, 455839 ella 455658 áðrenn 2. august.

Leygardagin 16. august kl. 16.00 giftast í Sands kirkju Arnleyð Tungá og Bergleif Sólsker, bæði av Sandi. Veitslan verður hildin í Samljóð í Skopun kl. 19.00. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma, biðjast vinarliga siga frá á tlf. 361632, 320487, 361650 ella 258889 í seinasta lagi 1. august.

30 ÁRA STARVSDAGUR

Í dag, 1. august, hevur Sára Olsen, deildarleiðari, 30 ára starvsdag á Skipafelagnum í Klaksvík.

FILMSTEIGURIN

Anger Management

Dave Buznik er ein, at síggja til, heilt vanligur maður við einum heilt vanligum arbeiði og eini fittari gentu. Hann er við øðrum orðum ein av teimum, tú ikki rættiliga leggur til merkis. Men á einum túri í flúgvari hendir nakað, sum vendir upp og niður á róligu tilveruna hjá Dave.

Meðan flogið var hevur Dave fleiri ferðir, men uttan eydnu, roynt at fáa flogternuna at geva honum hoyritelefonir, so hann kann fylgja við í filminum, sum verður vístur umborð. Men flogternan er meira upptikin av at práta við eina aðra flogternu, og tá Dave enn einaferð biðjur um hoyritelefonina, verður hon irriterað og biðjur hann taka tað róligt. Sjálvt um Dave sigur, at hann tekur tað róligt, verður trygdarvaktin umborð tilkallað. Støðan gerst verri, og Dave verður hildin aftur og fongslaður tá flúgvarin lendir.

Í rættinum verður hann dømdur til at skula fylgja einum skeiði har hann skal læra at stýra síni vreiði, og harvið verður róliga sinnalagið hjá Dave sett á eina harða roynd.

Leiðarin á skeiðnum, dr. Buddy Rydell, er nevniliga ein heilt eksentriskur persónur, sum - við sínum óvanligu framferðarhættum, fær eitthvørt menniskja at renna skríggjandi avstað. Og hinir luttakararnir á skeiðnum vísa seg eisini at vera ein løgin blanding av meira ella minni sinnissjúkum fólkum.

Tá Dave roynir at sleppa burtur frá øllum hesum meldrinum, gerst bara ilt verri. Hann verður dømdur til at lata dr. Rydell flyta inn hjá sær, so hann heilt kann fáa skil uppá sálarligu trupulleikarnar hjá Dave. Skjótt er tað torført at síggja, hvør hevur brúk fyri sálarligari hjálp…

Frumsýning
Fríggjadagin 01.08. kl. 20[30] Fríggjadagin 01.08. kl. 23[00]
Leygardagin 02.08. kl. 20[30] Leygardagin 02.08. kl. 23[00]
Sunnudagin 03.08. kl. 19[30] Sunnudagin 03.08. kl. 22[00]

Stórt úrval av DVD-filmum til sølu

HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo

Fríggjadagin 01.08. kl. 23[30] Leygardagin 02.08. kl. 23[30]
Sunnudagin 03.08. kl. 23[00]

Fríggjadagin 01.08. kl. 19[00] Leygardagin 02.08. kl. 19[00]
Sunnudagin 03.08. kl. 18[30]



Fríggjadagin 01.08. kl. 21[15] Leygardagin 02.08. kl. 21[15]
Sunnudagin 03.08. kl. 20[45]

BIO KIOSKIN
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm is - o.m.a.